

*Hvør einasta perla verður seymað á við hond.*

# Skraddarin í dreymalandi

Millum skitsurnar frá sjónleikinum Tornurósa situr skraddarin Beinta Vilhelmsen og skapar stórar, vakrar prinsessu-kjólar í alskyns litum og skapum. Hondseymaðu smálutirnir við perlum, blondum og brodaríum seta krúnuna á verkið

Í sýnisglugganum hjá Beintu Vilhelmsen, skraddara, hanga vakrir prinsessukjólar. Eigarin av verkstaðnum hevur nevniliga ein veikleika fyri stórum veitslukjólum við nógvum fínum smálutum. Serliga er hon kend fyri fínu korsagurnar.

Inni í búðini hjá Beintu Vilhelmsen kennist veikur blómuangi. Í bakgrundini hoyrist friðarligur tónleikur. Veggirnir eru ljósir, men prýddir við litføgrum pailettum.

Búðin er býtt í tvær forskotnar hæddir. Í neðra standa ginur við kjólum í alskyns litum og tilfari. Í erva finna vit verkstaðið við seymimaskinum, toyrullum og øðrum tilfari, sum skraddarin brúkar, tá hon seymar fyri fólk.

Beinta vísir okkum inn í eitt rúm á aðru hædd, har skitsur av ævintýrabúnum frá Tornurósu sjónleikinum hanga á vegginum. Hon elskar at gera búnar til sjónleikir, og seymaði eisini búnarnar til sangleikin Hair.

Hon bjóðar okkum te og greiðir frá, at hon, sum er einasti virkandi skraddari í Føroyum, hevur víðkað nógv um virkøsemið tey seinastu tvey árini. Keypt nógva professjonella útgerð, so sum seymimaskinur og dampanlegg. Fyribils ætlar hon at halda fram, eins og nú, her uppi við plantasjuna í Havn.

## Altíð verið handalig

Beinta greiðir frá, at hennara vørumerkið er at gera veitslukjólar, og tað er hon sera glað fyri, tí mótin broytist alla tíðina. So hon brúkar nógv nýtt tilfar, nýggir litir og ger nýggj ting allatíðina.

– Eg havi altíð verið dugnalig í hondunum. Tað var altíð mítt, sum bleiv víst fyri hondarbeiðisflokkinum sum fyrimynd. Eisini sat eg uppi langt út á náttina og seymaði og broderaði, sigur Beinta Vilhelmsen skemtandi.

Hon hevur verið útlærdur skraddari síðan 2003. Fyrst fór hon á tekniskan skúla í Danmark, har tey júst tá bjóðaðu eina fyrireikingarútbúgving til skraddaraútbúgving, sum so tók fýra ár afturat

Beinta Vilhelmsen var millum tey seinastu, ið fingu útbúgving sum skraddari, tí útbúgvingin er ikki til longur. Í dag eitur hon »klædnahandverkari« og er stytt niður í 3 ár.

– Munurin á einum skraddara og einum sniðgeva er, at skraddari er ein handverkaraútbúgving, og sniðgevi er ein skapandi útbúgving.

Skraddarar og sniðgevar arbeiða á hvønn sín hátt. Hetta kann kanska samanberast við arkitektin og timburmannin, heldur Beinta Vilhelmsen, sum ikki dugir at ímynda sær seg sjálva sita og tekna skitsur, velja litir og síðan lata ein annan gera rest.

Hon heldur tað vera stuttligt at forma tekstil, og síðan at síggja endaliga úrslitið á tí einstaka kundanum, sum hon lærir at kenna gjøgnum tilgongdina.

## Finnur íblástur allastaðni

Beinta fær íblástur nógva staðni frá. Og ofta er tað tilvildarligt, hvaðani íblásturin kemur. Eitt nú er internetið ein góð hjálp, har hon finnur íblástur frá stóru sniðgevunum.

– Tá eg ferðist, hyggi eg eisini nógv eftir fólki á gøtuni. So síggi eg kanska onkran lítlan smálut, sum mær dámar ordiliga væl. So skapi eg eina mynd av tí inni í høvdinum og brúki tað, tá eg komi heim, sigur hon.

## Nógv um oyruni

Men at vera skraddari er ikki altíð so lætt.

– Nú eri eg jú sjálvstøðug vinnurekandi. Tú skalt alla tíðina skaffa nýggjar kundar, og tú ert næstan til arbeiðis 24 tímar um døgnið, sigur hon.

So hon og Britt Nielsen, sum er næmingur hennara, sita nógv í verkstaðnum og arbeiða.

Har fáast tær við alt møguligt, líka frá at leggja buksur upp fyri handlar til smáar broytingar í klæðunum hjá fólki.

Men hon hevur eisini nógvar bíleggingar at taka sær av, til dømis kjólar, buksur, niðurdeilar, gallaklæðir og so framvegis.

Beinta fortelur, at í byrjanini arbeiddi hon ofta langt út á kvøldið, men nú dugir hon nógv betri at stýra tí.

## Góðska fram um alt

Skraddaraseymaði klæðir eru ikki bílig, og skal ein rinda fyri eitt dýrt plagg,